# Jól í Meksiko

Jólasiðirnir í Meksiko eru bygdur á meksikansku katolisismuna, og aðrar vælumtóktar, mentunnarligar siðir. Felagsheitið fyri hesar siðir er heitið "Posadas". Í einum tíðarskeiði, sum varir níggju dagar ganga fólk í bólkum frá hurð til hurð, og siga frá Mariu og Jósef, sum mangla eitt herberg. Hesir bólkar verða bodnir innar í heimini fyri at taka lut í útvekslan av gávum. Hóast granni við USA, so eru meksikansku jólasiðirnir so sterkir, at grannin hevur ikki ávirkað jólasiðirnar í Meksiko. Meksikanarar hava yvir 30 jólasiðir, sum eru serstakt meksikanskir. Meksikansk børn fáa ikki nakra jólagávu fyrr enn 6. januar – Trettanda – tá fáa tey eftir meksikanskum siði gávur frá Teimum Trimum Vísmonnunum. Børnini boða frá á einum lítlum lepa Teimum Trimum Vísmonnunum frá, at tey ynska eina jólagávu, so hesir kunnu geva børnunum eina gávu, samstundis sum teir geva Jesusbarninum eina gávu. Meksikansku jólaveitslurnar eru tær longstu í heiminum. Tær byrja 12. desember við føðingardegnum hjá La Guadalupana.






















